








Hevur tú áhuga fyri vinnumenning og vinnugransking, so átti tú at søkt avbjóðandi og spennandi starv í Vinnumálaráðnum.

**Starvið**
Fulltrúin skal vera við til at skapa karmar fyri nýggjum vinnum, vinnuligari menning og vinnuligari gransking.

**Starvið fevnir millum annað um at:**
- Menna fakliga grundarlagið undir nýmenningarpolitikki landsstýrisins.
- Samstarva við vinnuna, og við stovnar og ráð um menning og gransking.
- Samskipa og leggja til rættis virksemi á hesum økjum: vinnuframi, íverksetan, vinnugransking, samstarv millum alment og privat, kreativar vinnur, globalisering við meira.
- Samskifta, formidla og ráðgeva.

**Vit vænta at tú:**
- Hevur hóskandi útbúgving á kandidatstøði
- Hevur áhuga fyri politikki
- Setir mál og arbeiðir miðvíst
- Torir at hugsa nýtt og ikki vanabundið
- Samskiftir væl á føroyskum, skandinaviskum og enskum
- Er dynamisk/-ur og hevur skapanarlyndi

**Vit bjóða**
Sum fulltrúi í Vinnumálaráðnum kemur tú at virka í einum stimbrandi og mennandi umhvørvi. Tú verður partur av ráðgevandi toymi hjá landsstýriskvinnuni. Tú kemur at starvast í einum stjórnarráði við víðfevndum málsøkjum, so sum vinnulóggávu, ferðavinnu, loftferðslumál, alivinnu, tryggingarvinnu, arbeiðsmarknaði, infrakervi, elveiting, matvørutrygd, altjóða skipaskráseting, samskifti við meira – sí www.vmr.fo.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum viðkomandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsókn**
Send okkum eina umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi 7. juli 2008. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknir skulu sendast til:

Vinnumálaráðið
Postsmoga 377
Tinganes
FO-110 Tórshavn

Áhugað eru vælkomin at ringja til Arna Poulsen, aðalstjóra, á telefon 556070.

VINNUMÁLARÁÐIÐ